



*Betesdakórið á ferð í Íslandi á sumri í 1971. Myndina tók Eiler Rasmussen, fotografur, í Betesda. Aftanfyri frá vinstru (nøvnini eru, sum tey vóru í 1971): Jógvan við Keldu, sangstjóri, Jógvan Gerðalíð, ferðaleiðari, Maria Mortensen, Súsanna Vágsgarð, Ebba Høj, Rúna Joensen, Lis Danielsen, Naomi Høgnesen, Elisabeth Simonsen, Elisabeth Dragaberg, Karin Hammer, Henny Gerðalíð, Jórun Ziskasen, Josefina Hansen, Charlotta á Váli, Malan Jacobsen, Randfríð Skorheim, Sigga Jacobsen, Anna Joensen og Erna Østerø. Frammanfyri frá vinstru: Jóannes á Váli, Árni Jacobsen,*

# At ferðast í Íslandi er at liva

**Í ferðahugleiðingum úr Íslandi rundar Jóannes Hansen av við at siga frá vitjan á Akureyri, at siga eitt sindur um íslendska fiskivinnu og um at ferðast í Reykjavík, har hann fyrstu ferð vitjaði fyri 35 árum síðani**

FERÐAHUGLEIÐINGAR ÚR ÍSLANDI
5. PARTUR (ENDI)
*Jóannes Hansen*

Ætlanin var, at endi skuldi fáast á hugleiðingunum frá ferðini í Íslandi síðsta summar áðrenn 1. mai, tá ið sjøtul varð settur á nýtt frítíðarar. Hetta miseydnaðist. Tað hevur ikki verið pláss fyri hesum í vikuskiftisbløðunum. Eina ferð vóru tað blaðteknararnir, sum fóru við plássinum, og eina aðra ferð vórðu síðurnar brúktar til Norðoyatunnilin. Nú verður so roynt at fáa enda á ferðahugleiðingunum frá túrinum, sum umvegis Eysturlandið og Norðurlandið nú snúgva seg um Akureyri og Reykjavík og til hús aftur eftir Suðurlandinum.

Føroyingar hava altíð knýtt Ísland og fisk og fiskivinnu saman. Hetta eru tað fleiri orsøkir til, og fleiri teirra hava vit longu verið inni á, nú vit hava ferðast á Eysturlandinum og Norðurlandinum. Føroyingar hava fiskað nógv undir Íslandi, føroyingar hava siglt nógv við íslendingum, og fiskurin og fiskivinnan var í mong ár týdningarmiklasta lívsgrundarlagið hjá íslendingum. Nú er tað ikki bara soleiðis longur.

Tað liggur ikki í hesum, at fiskurin og fiskivinnan eru minkað. Heldur er tað soleiðis, at íslendiski búskapurin er vaksin nógv meiri á øðrum økjum, enn hann er vaksin í fiskivinnuni. Ferðafrásøgn frá summarferð runt Ísland er ikki forumið at fara út í æsir við hesum. Orsøkir og avleiðingar verða dagliga umrødd. Her verður bara staðfest, at tað verður roknað við, at handil við fiskikvotum og skráseting á íslendska virðisbrævamarknaðinum av feløgum í fiskivinnuni í níti árunum leysgóvu stórar upphæddir at arbeiða við. Virðið í fiskikvotunum hevur verið mett til 33 milliardir danskar krónur.

## Akureyri

Nú eru vit komin til Akureyrar á botninum á Eyjafirði, sum er longsti fjørður í Íslandi, og við høgum fjøllum kring og eyðkendu kirkjuni í miðbýnum. Komi at hugsa um sera turbolentu flogferðina úr Reykjavík og norður higar á sumri í 1971. Nú er loftvegis sambandið við størri flogførum, sum fleiri ferðir um dagin flyta nógvu vinnufólkini aftur og fram fyrst og fremst millum høvuðsstaðin og størsta býin uttanfyri høvuðsstaðarøkið. Hóast flogførini eru størri og lagaligari at ferðast við, enn tey vóru fyri 35 árum síðani, so kemur tað meiri enn so fyri, at turbolensurin yvir fjøllunum er stórur ta løtuna, sum flogfarið er í luftini á veg til Reykjavíkar.

Á mangan hátt minnir Akureyri um Havnina. Eitt er fólkatalið. Eitt annað er ferðslan í býnum. Um kvøldarnar brúka unglingarnir nógva tíð at koyra runt og runt í bilum. Júst sum tað verður gjørt í Havnini og aðra staðni í Føroyum.

Akureyri gjørdist keypsstaður í 1862 ella knappliga hálvt hundrað ár undan Havnini, sum varð keypsstaður í 1908. Fram við gomlu høvuðsgøtuni í miðbýnum eru stór hús í stásiligum gjøgnumførdum sniði. Danir, sum høvdu nógva handilin við stóra upplandið á Norðurlandinum um hendi, lótu í síni tíð hesi húsini byggja.

Umframt av fiskarínum og handlinum og tænastum í tí sambandinum livir býurin av ferðavinnuni og av at hýsa lærda háskúlanum. Ferðafólkatalið sigst knappast um tvey hundrað túsund um árið, og tað hevur serligan týdning, at tað hevur eydnast at fáa ferðafólk at vitja her á leið stóran part av árinum. At háárstíðin er so stutt er jú kanska størsti trupulleikin í føroysku ferðavinnuni. Bæði á Akureyri og kring alt Ísland eru tey eins og í Føroyum tilvitað um møguleikarnar, sum eitt nú konferansur av ymsum slagi bera í sær.

Kári á Rógvi, sum skrivar ph D ritgerð á lærda háskúlanum í Reykjavík, hevur tætt samstarv við lærda háskúlan á Akureyri. Seinasta árið hevur hann her í nøkrum skiftum undirvíst í stjórnmálafrøði á skeiðum fyri studentum í rættiliga altjóða kendum umhvørvi. Umframt studentar úr Íslandi eru luttakararar so manga staðni frá kring heimin. Bakgrundin og royndirnar hjá studentunum eru sjálvandi framúr íblástur til umhvørvið og lesturin.

Lærdi háskúlin á Akureyri sá dagsins ljós í 1987. Nú verður hann sagdur at vera størsta arbeiðsplássið á Akureyri. Tað búgva gott og væl sekstan túsund fólk á Akureyri, og tað verður roknað við, at í vetrarhálvuni eru umleið ein triðingur av teimum knýtt at undirvísingarverkinum. Á lærda háskúlanum eru umleið 1500 studentar og kanska hálvt annað hundrað starvsfólk.

Á lærda háskúlanum eru seks megindeildir, og tilboðini eru mong. Tey fevna eitt nú um fiskifrøði, løgfrøði, samfelagsfrøði, sálarfrøði, heilsufrøði, undirvísingarfrøði og tøknfrøði. Eitt sindur av samstarvi er millum Fróðskaparsetur Føroya og lærda háskúlan á Akureyri, og tað kann ikki hugsast annað enn, at hetta samstarvið fer at mennast. Fyritreytirnar í Havnini og Føroyum sum heild og á Akureyri tykjast vera ógvuliga líkar á so mongum økjum.

Mentanarlívið er ríkt, men tað eru ikki stundir at gera meiri við tað.

Hetta er ein leygardagur, at vit vitja á Akureyri. Ætlanin er at vera í Reykjavík nakrar dagar, áðrenn heimferðina við Norrønu hósdagin í næstu viku. Í skundi verður avgerð tikin um, at kósin skal setast móti Reykjavíkar leiðini leygarkvøldið. Vit koyra í tríggjar tímar, og harvið flyta vit okkum yvir í tað økið, sum føroysk ferðafólk eru mest kend við í Íslandi.

Á vegnum vestureftir síggjast vegskilti, sum vísa móti Ólafsfirði og Siglufjørðinum. Ólafsfjørðurin er uttarlaga á vestara armi á Eyjafjørðinum. Tað var har fleiri føroyskir fótbóltsspælarar fyri nøkrum árum síðani hjálptu Leiftri, sum varð fíggjað av fólki í fiskivinnuni.

Siglufjørðurin vendir norður móti Norðuríshavinum. Hetta er eitt av íslendsku plássunum, sum føroysk skip hava vitjað heilt nógv. Her ber ikki til at fara inn á veldugu broytingarnar, sum Siglufjørðinum hevur verið fyri, síðani hann inntil fyri hálvari øld síðani var stóri sildastaðurin á Norðurlandinum.

Tað er tungt at reka samfelagið her norðuri. Í heyst var fólkaatkvøða á Ólafsfirði og Siglufjørðinum um samanlegging. Stórur meiriluti var í báðum plássunum fyri at leggja saman. Næsta takið verður at gera tunnil millum hesi bæði plássini.

D. P. Danielsen, sáli, lýsir í ferðafrágreiðing síni í 1977 busstúrin av Akureyri og umvegis Ólafsfjørðin og norður á Siglufjørðin. Hann visti at siga, at bergholið, sum hevði gjørt ein part av farleiðini høgligari, enn hon hevði verið, var tað fyrsta í Íslandi og fór ivaleyst at verða tað einasta. Grótið er so moyrt, søgdu teir! Síðani er nógv vatn runnið í ánna. Vit fara við ferð vestur eftir og suður eftir. Tá ið vit nærkast høvuðsstaðarøkinum vísa skiltini á undirsjóvartunnilin undir Hvalfirði. Og so er ikki so leingi, inntil vit fara at teljast millum mongu ferðafólkini, sum eru komin úr øllum ættum og herðashornum og til Reykjavíkar.

Vit hava á kunningarstovuni á Akureyri bílagt býli nakað væl norðanfyri Reykjavík. Talan er um sethús, sum ivaleyst eru frá millumkrígstíðini. Tey standa eitt sindur einsamøll oman móti einum vatni. Støddin og sniðið boða frá, at familja, sum hevur verið væl fyri, hevur latið húsini byggja. Nú býr eingin her. Húsini eru eitt slag av vallaraheimi. Ein hálendingur í arbeiðsørindum og nakrir amerikanskir ferðamenn halda til her hetta kvøldið, umframt onkrir íslendingar, sum ferðast í egnum landi. Pottar við heitum vatni eru uttanfyri. Tað ber til at matgera, og so eru stundir og umstøður at kanna eitt sindur, hvussu íslendska fiskivinnan er samanskrúvað.

Hóast týdningurin av henni er minkaður, so er tað framvegis soleiðis, at umleið 60 prosent av útflutninginum stava frá fiskivinnuni, og tað er framvegis soleiðis, at mesta samstarvið millum føroyingar og íslendingar